# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit eru trúlovað. Hetta er ein stórur og eydnuríkur dagur, men tað kemur ikki óvart á nakran*

*Joachim prinsur í oktobur 2007*

# Joachim og Marie giftast í morgin



*Joachim og Marie Cavallier hittust fyrstu ferð á heysti í 2003, og tey vórðu trúlovað í oktobur í fjør*

*Mynd: Polfoto*

**Seinnapartin í morgin verða Joachim prinsur og unnusta hansara, Marie Cavallier, vígd í kirkjuni í Møgeltønder í Suðurjyllandi**

Tað er keypmannahavnarbispur, Erik Norman Svendsen, sum vígir tey bæði klokkan fýra seinnapartin í morgin.

Aftan á vígsluna eru gestirnir bodnir í brúdleyp á slottinum Schackenborg, har tey nýgiftu hjúnini skulu búgva. Hetta slottið var ogn hjá Schack-ættini, til kongshúsið yvirtók tað í 1978. Joachim prinsur hevur havt tað um hendi og hevur búð har síðani 1993.

Í sambandi við vígsluna í morgin verður skipað fyri ymsum tiltøkum í Møgeltønder og aðrastaðni. Millum annað hava kvinnur í býnum tikið seg saman at skipa fyri einum stórum kaffiborði, har pláss er fyri umleið 300 gestum, og í annaðkvøld skulu 250 fólk ganga kyndlagongu til Schackenborg.

Hetta er aðru ferð, at Joachim prinsur giftist. Fyrru ferð var við Alexandru, sum nú er greivinna. Tey vórðu sundurlisin á heysti í 2004 og skild á vári í 2005. Joachim og Alexandra fingu synirnar Nikolaj og Felix.

# Hóttu við at skjóta flogfarið hjá Tony Blair niður



*Tony Blair visti ikki, at tvey ísraelsk jagaraflogfør mundu skotið flogfar hansara niður fyrradagin*

*Mynd: Polfoto*

**Tað var um reppið, at ísraelsk jagaraflogfør skutu flogfarið við Tony Blair niður fyrradagin**

Tony Blair, sum er serligur sendimaður hjá teirri sokallaðu Miðeystur-kvartettini (ST, USA, ES og Russland) var mikudagin á veg við flogfari úr Egyptalandi til Ísraels, tá tvey ísraelsk jagaraflogfør nærkaðust flogfari hansara og gjørdu seg til at leypa á.

Ísraelska flogvápnið hevði fleiri ferðir roynt at fáa samband við flogfarið við fyrrverandi bretska forsætisráðharranum, men tað hevði ikki svarað. Tí bar ísraelska herleiðslan ótta fyri, at talan kundi vera um eina yvirgangsatsókn, og tvey jagaraflogfør av slagnum F-16 vórðu send avstað. Sambært bretska blaðnum The Times vóru flogførini eftir øllum at døma vápnað við rakettum av slagnum Python.

Ikki fyrr enn tey bæði jagaraflogførini komu so nær flogfarinum við Blair, at flogskipararnir fingu boðað hinum frá, hvat teir høvdu í kvittanum, svaraði flogskiparin á flogfarinum hjá Blair. Sambært The Times vantaði tá lítið í, at ísraelsku jagaraflogførini skutu.

Sambært blaðnum bleiv Tony Blair ikki kunnaður um málið, fyrr enn flogfar hansara hevði sett seg í Betlehem.

Ísraelska blaðið Maariv skrivar, at tað vóru tekniskir trupulleikar, sum gjørdu, at flogskiparin á flogfarinum við Blair ikki fekk givið boð frá sær. Blaðið skrivar frá fregnartænastukeldum, at flogvápnið er sera vakið í hesum tíðum, tí vandi kann vera fyri, at Hizbollahrørslan fer at senda smá flogfør inn í ísraelskt loftrúm at søkja at málum í Ísrael.

## STUTT SAGT

### Til hús hóast hóttan

Andstøðuleiðarin í Zimbabwe, Morgan Tsvangirai, sigur, at hann fer til hús leygardagin, sjálvt um tað ljóðar, at onkur hevur lagt ætlanir um at beina fyri honum, tá hann kemur heimaftur. Tsvangirai hevur ferðast runt Zimbabwe tann seinasta mánaðin fyri at savna sær stuðul, nú stjórnin hevur gjørt av at halda forsetaval av nýggjum. Tað fyrra valið var í mars. Tað vann Morgan Tsvangirai, men sambært myndugleikunum fekk hann ikki tey neyðugu 50 prosentini av atkvøðunum, og tí verður umval.

Andstøðan hevur fleiri ferðir lagt Robert Mugabe, forseta og myndugleikarnar undir at ætla at beina fyri andstøðuleiðaranum. Upprunaliga skuldi Tsvangirai fara til gús seinasta leygardag, men settist aftur. Nú sigur hann, at hann fer til hús í morgin.



*Morgan Tsvangirai er hóttur við lívinum*

*Mynd: Polfoto*

### 18 ferðir á Mount Everest

Tá tann 47 ára gamli Appa Sherpa kom niðan á tindin á Mount Everest í gjár, setti hann eitt nýtt met, tí hetta var 18. ferð, at hann stóð á heimsins hægsta fjalli, og so ofta hevur eingin annar verið har uppi. Appa Sherpa, sum er uppvaksin niðan fyri Mount Everest, var fyrstu ferð uppi á fjallinum í 1989. Sambært skrásetingini hava umleið 2.500 fólk verið uppi á Mount Everest, síðani Edmund Hillary og Tenzing Norgay komu niðan á fjallið í 1953.